

# Lógin er í hjartanum – ik

**Kristin og politisk sannføring møtast har tú inni í hjartanum veitst, hvat er rætt og hvat er skeivt. Tí skulu vit finna lógina í hjartanum og ikki í bókini. Hetta sigur Margrete Auken, danskur prestur og limur í ES-parlamentinum**

## Samrøða



**Rigmor Dam**
blaðkvinna
rigmor@sosialurin.fo

Religión og politikkur eru evni, sum veruliga kunnu fáa sinn, fólkasløg og lond í kók.

Og samanrenningin av evnunum báðum, er ein ikki minni vandamikil kokteylur – verður mangan sagt.

Men tað finnast ymsir hættir at arbeiða politiskt, eisini tá tú hevur trúnna tætt at tær. Hetta er danski ES-parlamentslimurin og prestur-in Margrete Auken úr SF eitt gott dømi um.

Tá vit her á landi tosa um religión og politikk, hugsa tey flestu helst um kristiligar flokkar og politikarar, sum úr sætinum lyfta Bíbliuna á loft og brúka Orðið, sum argument í orðaskiftinum.

Sosialurin